

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 11 - 2011

# Statoil vónar at fáa hat-trick

Norska oljustýrið hevur givið Statoil loyvi til at bora brunnin King Lear í Norðsjónum. Hetta er tann triði og seinasti sokallaði high-impact brunnurin, sum felagið skal bora á norskum øki í ár. Teir báðir fyrru vóru Skrugaard og Aldous Major, sum eydnaðust til fulnar, og nú vónar Statoil sum vera man at fáa hat-trick við tí triðja. Statoil brúkar hugtakið high-impact, tá talan er um leitibrunnar við meiri enn 250 milliónum tunnum av olju, ella um parturin hjá Statoil er mettur at vera oman fyri 100 milliónir tunnur. "Mærsk Gallant" skal borga King Lear-brunnin, sum er 10 fjórðingar norðan fyri Ekofisk-leiðina. Statoil er operatørur og eigur 77,8 prosent av loyvinum. Total E & P Norge eigur hini 22,2 prosentini.